Tórshavn, hin 11. mai 2010
Málnr.: 403-201000337-1

**HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Útgáva 2
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## Matur út úr húsinum

### Endamál
Gera mat at koyra út úr húsinum til veitslur, tiltøk o.l. Borðreiðing aðrastaðni enn har maturin verður gjørdur.

**Hølir**
- Goymsla til turrvørur
- Køli- og frystiskpanir
- Goymsla til flutningskassar/borðbúnað.
- Køkur/viðgerðarrúm
- Skiftirúm og vesi til starvsfólk.
- Rúm/stað til burturkast
- Rúm við skolivaskið til reingerðaramboð og reingerðarevni
- Bilur

**Innrætting**
Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd), og hølini skulu vera hóskandi í mun til hvørt annað.

**Vegleiðing til innrætting**
- Goymslurúm/stað til turrvørur, flutningskassar, borðbúnað og annan útbúnað, sum verður nýttur til matgerð/borðreiðing. Um flutningskassar verða endurnýttir skulu hesi kunna vaskast og stað skal vera tókt til hetta.
- Nóg stórar frysti-og køliskipanir við sjónligum termometuri. Hesar kunnu vera í rúmi fyri seg , í køkinum ella á goymsluni.
- Køkurin skal vera nóg stórur og soleiðis innrættaður, at pláss er fyri at virka tey ymisku matsløgini, uttan at vandi er fyri kross dálking.
- Hurðar skulu ikki vera frá køki ella viðgerarrúmið beinleiðis út í tún. Evt. Hurð skal verða segla.
- Vesi, við forrúmi. Handvask skal vera á vesinum ella í forrúminum.
- Skiftirúm kann verða í forrúminum til vesi, um umstøðurnar eru til tess. Arbeiðsfólk skulu ganga ígjøgnum matframleiðslurúm ella onnur "rein" rúm í egnum klæðum/yvirklæðum.
- Eitt rúm ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, skal vera til reingerðaramboð og reingerðarevni. Skolivask til spillvatn frá reingerðini.
- Bilurin skal vera soleiðis innrættaður, at flutningur av mati fer fram á ein heilsufrøðiliga fullgóðan hátt. Bilurin skal kunna vaskast innan, eingin teppir, toymáttur e.l. skal vera í bilinum, har maturin stendur.

**Útbúnaður**
- Handvask á árendum stað við flógvum vatni har kranin ikki er handstýrdur. Flótandi sápa og eingangshandklæði og ruskspann við øll handvøsk.
- Matvask til at vaska grønmeti, kjøti o.a. Sama matarvask kann ikki nýtast til grønmeti og rátt kjøt.
- Uppvask vaks til at vaskaborðbúnað, grýtur o.a. um neyðugt skal uppvaskimaskina vera, sum vaskar við 85° C. Ella eitt longri vaskiprogram við 65 °C
- Allur leysur útbúnaður, amboð, el-kaðal o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum á hillum e.l., eisini reingerðaramboð.
- Skermast skal rundan um ljós í rúmum, har viðgerð av mati fer fram. Brotsikkur ljós kunnu eisini nýtast.
- Toygardinur, forhang o.l. skulu ikki vera í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.
- Um vindeygu kunnu latast upp har matgerð fer fram skal flugunet vera fyri.

**Tilfar**
- Veggir, gólv, loft, hurðar og vindeygakarmar skulu vera úr hørðum, sløttum, ljósum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.
- Allur útbúnaður skal vera úr hørðum og sløttum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.

**Burturkastskipan**
- Burturkast skal beinast út úr køkinum eftir hvørja matgerð/framleiðslu. Verður arbeitt nógv út í eitt, skal burturkasti koyrast út minst eina ferð dagliga ella eftir tørvi.
- Burturkastið skal flytast við góðkendari skipan (KOB/IRF).

**Reingerð**
- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein eftir tørvi, tó minst eina ferð hvønn arbeiðsdag.
- Skrivlig reingerðarætlan skal vera og henda skal fylgjast.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð, og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Persónligt reinføri**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað**
- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at liðugt vøran ikki verður dálkað av rávøruni ella nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.